# Liverpool setir nøglina í

Liverpool ger nú púra greitt, at hvørki Xabi Alonso ella Javier Mascherano eru til sølu. Hesir báðir spælararnir verða støðugt nevndir í sambandi við onnur feløg, men Liverpool ætlar sær ikki at selja teir. - Hóast nógvan slatur um Alonso og Mascherano hevur Liverpool einki boð fingið uppá hesar spælarar, og teir eru ikki til sølu, sigur Liverpool í einari almennari fráboðan.



# Vidic velur United

Summarsøgur ganga eisini um, at verjuspælarin Nemanja Vidic, sum er blivin ein av profilunum í Manchester United, skal seljast, og bæði Inter, Real Madrid og Barcelona eru nevnd í sambandi við spælaran. Men Vidic sjálvur ætlar sær ikki at skifta felag. - Eg trívist væl í United, og enskur fótbóltur passar væl til mín, so eg haldi fram í felagnum næsta kappingarár, sigur Vidic við News Of The World.

Føroyar-Italia 22-28 (13-12):

# Nærri verður tað ikki

**Manslandsliðið í hondbólti var so nær tí stóra úrslitinum, sum tað ber til at vera. Men tað kostaði nógv, tá tríggir opnir møguleikar vórðu brendir mest sum á rað**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað vóru teir so væl kendu marginalarnir, sum ikki vóru við føroyska liðnum í dystinum móti Italia leygarkvøldið.

Fyri tað nógva, so spældi føroyska liðið ein kanóndyst, og sum dysturin leið, sóust alt sjónligari frustratiónir hjá mótstøðuliðnum. Ikki minst á venjarabeinkinum, har italski venjarin ta einu ferðina varð noyddur at taka mann út í tveir minuttir, tí dómaraborðið hevði fingið nokk av skjóttgangandi illbønum hansara.

Men heldur ikki hetta hjálpti hjá føroyska liðnum. Og tá má tað væl leggjast afturat, at marginalarnir ikki eru nakað, sum koma av sær sjálvum.

## Ov heitir

Veruleikin er nevnliga eisini, at tú skalt arbeiða fyri at fáa marginalarnar í tín part. Tað krevur hegni, dugnasemi og til tíðir eisini eitt ísakalt høvd, um tú skalt vinna tær spentu støðurnar úti á vøllinum, og tað var hetta, sum føroyska liðið ikki megnaði.

Teir tríggir stóru møguleikarnir endurspeglaðu eisini hetta. Leingi hevði dysturin ridlað á vágskálini, og í verjupartinum tóktust okkara lítlu menn veruliga at hava fingið takið á væl vaksnu italiumonnunum.

Møguleikin var at økja til 18-17, tá verjan enn einaferð hevði fangað ein kontrabólt, so Birgir Poulsen kundi sendast avstað, men púra einsmallur langaði hann bóltin á tvørtræið. Bárður Johannesen skeyt beint í krovið á málverjanum, tá hann sera hegnisliga snýtti alla italsku verjuna í samanspæli við Hans Áka Dal-Christiansen. Og Sámal Joensen valdi onkursvegna at lobba, tá hann við skotfintu snýtti italsku bakketuna, og so hevði málverjin lisið royndina av.

## Spældu sín møguleika

Tá hetta er sagt, so gav





*Sámal Joensen varð eftir dystin kosin at vera besti føroyski spælarin í dystinum móti Italia*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Hava eisini tørv á léttari dystum

**Sámal Joensen er fegin um stóru avbjóðingarnar hjá landsliðnum, men hann heldur samstundis, at tørvur eisini er á meira yvirkomuligum uppgávum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Italia á heimavølli varð í hesi undankappingini mett sum dysturin, har Føroyar kundu vinna sær okkurt stigið, men leygarkvøldið var Sámal Joensen skjótur við turrisligu staðfestingini um, at tann møguleikin nú var farin. Og hann var eisini skjótur at staðfesta, hví so var.

- Tað var tað sama kortið í seinna hálvleiki, sum eisini kostaði okkum nógv hósdagin. Á leið frá fimta til tjúgunda minutt. Tá gera vit alt ov nógv mistøk – eisini í verjuni - og vit verða revsaðir fyri tað.

Er orsøkin kanska, at orkan ikki heilt er til hetta støðið í 60 minuttir?

- Eg haldi tað er for bíligt at skylda upp á tað. Nú hava vit runnið, síðani kappingin endaði, og í dag merktu vit, at teir eisini vóru móðir.

So tað er kanska meira at duga at halda høvdið kalt alla tíðina?

- Ja, nemliga. Sjálvt tá tú ert móður, so skalt tú vera konsentreraður, og tað dugdu teir betur enn vit.

Og tað er væl bara ein máti at læra tað uppá?

- Ja. Tað er at venja og venja og so sjálvandi at fáa fleiri javnar dystir. Tað blívur sjálvandi ikki við at vera stuttligt at tapa móti Russlandi. Tað hevði eisini verið stuttligt at fingið fleiri dystir móti Grønlandi og Luxemburg og londum, sum eru á tí støðinum.

- So kunnu vit eisini fáa dystir av hesum slagnum, men tú blívur ikki betri av at blíva við at tapa við 20 málum.